Kvørkveggja *Turdus merula*

Sólrun var tann fyrsti kvørkveggjuungin, ið varð klaktur í bygdini í Nólsoy - tí royndu vit at bjarga “henni”.
Hon datt úr einum reiðri á einum neysti niðri við keiina, og kom so niðan til okkum.

Vit løgdu beinið í skinnara, ein tendstikkur var ov tjúkkur, so vit brúktu ein tannstikkara í staðin.
Vit høvdu hana inni í 3 vikur, ambætaðu hana við mjølormum og síðani maðkum, sum vit máttu læra hana at finna. Hon var øgilig áhugað, tá vit fóru útum at grava eftir reyðmaðkum, men hon ræddist teir sum pestin, so vit máttu klippa teir sundur, áðrenn hon vildi eta teir. Egentliga løgið, tí hon ræddist ikki livandi mjølormarnar. Men so fann djóravinurin í húsinum upp á ráð - vit settu eina undirskál við eitt sindur av mold í, og har sleptu vit so livandi maðkar í, so hon kundi læra at "finna" teir sjálv.

Tá beinið var vaksið saman, varð hon ringmerkt á hennara høgra beinið - vanliga ringmerkir man altíð vinstra beinið; men tað hildu vit ikki verða so gott, tá tað akkurát var vaksið saman aftur.

Tá vit sleptu henni, fóru vit oman í bygdina við henni, tí har vóru fleiri runnar, so har skuldi hon betri kunnað vart seg fyri kettum. Síðani settu vit hana á tekjuna hjá læraranum, og vónaðu, at foreldrini komu til hana. Tað gekk bert ein løta, so vóru foreldrini hjá henni og bóru henni maðkar; men hvat hendi - hon ræddist foreldrini og pippaði so hart og so leingi, at lærarin mátti upp á tekjuna at taka hana niður aftur. Hann setti hana so á plenuna, og so krossaðu vit øll fingrar fyri, at eingin ketta tók hana. Vit hildu eitt vakið eyga við henni, og longu dagin eftir var hon saman við foreldrunum.

Sólrun kom norður aftur til okkum óteljandi ferðir, pippandi av gleði, og hvørja ferð sat hon á høvdinum á postkonuni Onnu, sum hon kendi so væl. Fóru vit oman í bygdini, gekk eisini bara ein løta, so var hon har og setti seg á okkum, so vit máttu sníkja okkum framvið veggunum, so hon ikki sá okkum og kom aftaná.

Sólrun livdi bara í eitt ár, og tá hon hvarv, fingu vit ikki ringin, so helst hevur ein ketta dripið hana.

Ótrúliga stuttligt og gevandi at hava fuglar í pleygu; men sera krevjandi.
Síðan Sólrun hava vit havt óteljandi aðrar fuglar í pleygu. Allir eru komnir fyri seg og sleptir aftur, uttan smyrilin Rasmus, sum vit høvdu sitandi í meira enn eitt ár. Hann misti ytsta liðið av øðrum vonginum - tað var brent av, tá henn rendi á ein lyktapela.


©Jens-Kjeld Jensen